Føroyingar nógv at læra - mugu m.a. góðtaka at vera tøkir alt samdøgrið

Vágs Skipasmiðja til sveinaroynd í komandi oljuvinnu

-Eg haldi, at okkara fólk hava klárað seg væl. Her er nógv at læra og ikki minst hetta, at tú mást vera tøkur alt samdøgrið alla vikuna sigur Gudmund Jacobsen, stjóri. Hann er sera væl nøgdur við samstarvið við bæði Mærsk Contractors og Danop

Hans er ein av teimum fýra monnunum hjá Vágs Skipasmiðju, sum hevur verið við í bortarbeiðinum í Lopra frá byrjan. Mynd jan

JAN MULLER

Hesar seinastu mánaðirnar nógv arbeiði hevur verið á borplássinum í Lopra, hevur eisini verið væl av virksemi í oynni í sambandi við boringina.

Eitt av teimum virkjunum, sum hevur havt nógv at gera og veruliga er sloppið at royna seg í hesi heilt nýggju vinnu er Vágs Skipasmiðja.

Áðrenn boriarbeiðið fór í gongd vóru fólk frá Mærsk Contractors í Vági og høvdu fundir við leiðsluna á skipasmiðjuni. Burtur úr hesum kom eitt fruktagott samarbeiði. Fýra av ungu starvsfólkunum á Skipasmiðjuni vórðu útvald til at fara til Danmarkar á skeið og at royna seg umborð á borpalli hjá Mærsk.

Tá boringin í Lopra fór í gongd vóru hesi fýra millum borifólkini og hava verið har síðani.

Gudmund Jacobsen, stjóri á Vágs Skipasmiðju: Tað hevur verið spennandi at vera við í arbeiðinum í Lopra.

Mugu vera tøkir alt samdøgrið

Vit spurdu Gudmund Jacobsen, stjóra á Vágs Skipasmiðju, hvussu hann metir starvsfólk hansara og annars verkstaðurin hjá skipasmiðjuni hava klárað at liva upp til hesa heilt nýggju avbjóðing!

-Vit hava lært nógv av hesum. Tú hevur verið noyddur at hava fólk tøk alt samdøgrið runt, so hetta er nakað nýtt fyri okkum føroyingar at skula vera „stand by" 24 tímar um samdøgrið, 7 dagar um vikuna og 31 dagar um mánaðin.

Gudmund heldur fyri, at hóast talan ikki hevur verið um nakur stórarbeiði so hava teir tikið sær av nógvum uppgávum, størri sum minni. Hetta fevnir um alt frá specialuppgávum til at vera á staðnum við motrikkum.

Sera gott samstarv

-Vit hava havt eitt avbera gott samarbeiði við Mærsk Contractors og Danop. Allar avtalur hava hildið og eg eri fegin um, at fýra av okkara fólkum hava kunnað útvegað sær royndir á borplássinum.

Gudmund Jacobsen vísir á, at høvuðstreytin fyri at vera við í hesi nýggju vinnu er at halda avtalur og at kunna levera eina tænastu alt samdøgrið.

-Tú mást hava góðar sveisarar og góðar smiðir, og eitt aðalkrav er, at teir hava sertifikat og at trygdin er í lagi.

Útgerðarhavn

Tað hevur annars verið uppá tal at byggja upp eina basa - útgerðarhavn í Suðuroynni í sambandi við eina komandi oljuvinnu. Vit spurdu Gudmund Jacobsen, um tað er umráðandi at hava eina slíka havn í Suðuroynni.

Hann vísir á, at hetta er so upplagt men hvar hon skal liggja má vera upp til teir, sum skulu brúka hana. Tað er einki loyndarmál í Suðuroynni, at fólk frá Mærsk í Esbjerg hava verið í oynni fyri at hyggja eftir møguligum plássi til útgerðarhavn. M.a. hevur verið hugt at møguleikunum á Drelnesi.

Enn er tó einki ítøkiligt frammi, men arbeitt verður so við tankanum.

Umframt at hava verið stand by fyri borplássið í Lopra so er eisini væl av øðrum arbeiði á skipasmiðjuni í Vági. Í løtuni eru teir í gongd við eitt stórarbeiði. Tað er at seta nýtt forstevni í Mai, sum herfyri sigldi á keiðina í Rúnavík.

Teir hava í hesum sambandi fingið eitt risastórt eikstykki úr Suðuramerika. Eisini verður í løtuni arbeitt uppá 40-tonsaran Marita.

-Vit hava havt rættiliga javnt av arbeiði alt árið. Her eru 15 mans til arbeiðis, haraf fleiri hava verið knýttir at boringini í Lopra sigur Gudmund Jacobsen, sum vónar, at tað í framtíðini fara at vera uppgávur til teirra í sambandi við eina møguliga komandi oljuvinnu.

-Eg haldi vit hava klárað okkum væl, og kann bert siga, at vit hava verið sera væl nøgdir við samstarvið við bæði Mærsk og Danop.

Vágs Skipasmiðja er millum størstu privatu arbeiðsplassini í sunnaru helvt av oynni.

Allir tingmenn á skúlabonk at kunnast um olju

Áhugin hjá tingmonnum fyri oljumálinum var ikki stórur, tá fyrispurningar vórðu svaraðir í tinginum nakað herfyri. Nú bjóðar løgmaður teimum til kunnandi fund

JAN MULLER

Í sambandi við at Oljuráðleggingarnevndin hevur fund í Havn í hesum døgum um m.a. komandi oljulóggávuna, hevur løgmaður gjørt av at bjóða øllum tingmonnum á fund við nevndini fyri at kunna seg við tað arbeiði, sum nevndin hevur gjørt higartil. Eisini verður høvi at seta nevndini spurningar.

Fundurin verður hósdagin klokkan 13.30 í høllini á Hotel Hafnia.

Oljuvinna nærkast

Edmund Joensen, løgmaður sigur við Sosialin, at higartil hevur talan mest verið um at kunna Uttanlandsnevndina hjá løgtinginum um marknatrætuna við bretar. Nú oljuvinnan nærkast Føroyum eru tað nógvir ymiskir spurningar, sum eru av áhuga fyri alt løgtingið, herundir útbjóðing, skatta-, umhvørvis- og vinnupolitikkur.

Hesi málini nerta við arbeiði hjá øllum nevndunum í løgtinginum, og tí heldur løgmaður, at tað er eitt gott høvi nú at bjóða tingmonnum til fundar.

Hann sigur eisini, at tað undir fíggjarlógarviðgerðini tyktist at vera vaksandi áhugi fyri øllum oljuvirkseminum og har vísti seg eisini ein trongd til at fáa meiri kunnleika um hetta málið.

-Tí havi eg tikið stig til, at allir tingmenn, alt landsstýrið og allir serfrøðingarnir á økinum vera við.

Oljulóggáva í bitum

Undir fíggjarlógarviðgerðini mælti m.a. formaður Javnaðarfloksins, Jóannes Eidesgaard, til, at tingmenn fingu meiri innlit í oljumálið sum heild. Hann spurdi m.a. um ikki tað kundi verið eitt hugskot at látið tinginum bitar av oljulóggávuni sohvørt hesir vóru liðnir, soleiðis at ikki allur lógarpakkin varð lagdur fyri tingið í senn.

-Allur útviklingur í samfelagnum kann blíva ávirkaður av oljuni, og tí er tað avgjørt ein almenn uppgáva at stýra hesi vinnu heilt frá byrjan av.

-Tú ber ikki ótta fyri, at vit eru á veg inn í ein útvikling, sum vit als ikki verða førir fyri at stýra - ein útvikling, sum kanska longu hevur yvirhálað okkum?

-Tað beri eg ikki ótta fyri, men vit hava sæð, at tað er skjótt, at samfeløg kunnu fáa varandi mein av einum slíkum útviklingi. Men har er tað kanska serliga „grátigheitin", sum er orsøkin, og tað at ein ikki hevur givið sær stundir til tær neyðugu fyrireikingarnar. Tað haldi eg sjálvur vit hava gott tak á í løtuni og vóni eg, at allir politikarar standa saman og fáa endað hetta stóra lóggávuarbeiði, soleiðis at vit fáa eitt haldgott fundament at byggja á.